# Reglugerð fyri Posteftirlitið

Landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur fyri virksemi Posteftirlitsins ásett fylgjandi:

I. Bygnaður
§ 1. Posteftirlitið er stovnur undir Vinnumálastýrinum. Til tess at tryggja rationellan rakstur verður stovnurin umsitingarliga lagdur saman við Fjarskiftiseftirlitinum.

II. Uppgávur
§ 2. Posteftirlitið útinnir skráseting og eftirlit sambært postvirksemislógini § 20, stk. 1-4.

§ 3. Posteftirlitið veitir ráðgeving um galdandi lóggávu og um onnur viðurskifti á postøkinum.

§ 4. Posteftirlitið ráðgevir landstýrismanninum og miðfyrisitingini annars um faklig viðurskifti á postøkinum og skal harvið eisini tryggja áhaldandi eftirmeting og kunning um royndirnar viðvíkjandi galdandi rættarreglum á postøkinum.

§ 5. Posteftirlitið fylgir teirri tøkniligu og búskaparligu menningini innan postvirksemi.

§ 6. Posteftirlitið móttekur, viðger og ummælir umsóknir um konsessión til postvirksemi og ger tilmæli til landsstýrismannin.

§ 7. Posteftirlitið skal á hvørjum ári í seinasta lagi 1. apríl leggja fyri landsstýrismannin frágreiðing um virksemi stovnsins og gongdina á postmarknaðinum í farna árinum. Fyrstu ferð í ár 2003.

III. Gildiskoma

§ 8. Henda reglugerð kemur í gildi 1. mai 2002.

**Vinnumálastýrið**

Tórshavn tann 24. apríl 2002

Bjarni Djurholm
landsstýrismaður

/Arne Poulsen